# PREP-skeið fyri hjún

**Um skeiðið**:

- Verður leygardagarnar 3. og 17. mars frá kl. 9-18 á Brekku 3, Hoyvík.
- Undirvísing kryddað við dvd-klippum, rolluspølum og tónleiki.  Unn & Jógvan og Durita & Pauli undirvísa.
- Pørini arbeiða sjálvstøðugt og ikki í bólkum, so talan verður ikki um at blanda onnur í eins hjúnalag.
- Prísur 1.200 kr pr. par.  Hetta er íroknað undirvísing, tilfar og mat.
- Tilmelding hjá Duritu og Paula á tlf. 316099 ella djurholm@kallnet.fo. Seinasta freist er 25. februar 2007.

**Evnir**

- Kærleiki
- Væntanir og leiklutir
- Vandaeyðkenni
- Samskifti og trupulleikaloysn
- Lívsvirðir
- Stuttleiki og vinskapur
- Nærleiki og kynslív
- Fyrigeving
- O.a.

**Hvønn er PREP fyri?**

- PREP er fyri øll pør í øllum aldrum og lívsfasum, sum ynskja at arbeiða uppá hjúnalagið.
- Nýgift pør kunnu fáa góðar samskiftisvanar frá byrjan av samlívinum.
- Pør, sum hava verið gift í longri tíð, kunnu fáa hjálp til at bróta  ringar vanar ella fáa íblástur til at víðarimenna tað góða í teirra hjúnalagi.

**Hví fara á PREP-skeið?**

- Tí kærleiki og trivnaður kann vaksa, um man í felag arbeiðir fyri tí
- Tí nógv pør hava trupulleikar viðvíkjandi góðum samskifti
- Tí børn hava gleði av, at foreldur teirra seta tíð av til at røkja teirra hjúnalag

**Citat frá fólki, ið hava verið á PREP-skeiði**

*"Ein tann besta íløga vit hava gjørt, er at seta tíð av til at arbeiða uppá okkara hjúnalag.  Tað hevur givið okkum eitt felags (tungu)mál  og amboð at arbeiða við, sum hjálpir okkum í dagliga samskiftinum og tá ósemjur uppstanda.*
*Tað er sera gevandi at fara saman á skeið og miðvíst læra og arbeiða við viðurskiftum, sum eru viðkomandi fyri  hjúnalagið.  Tað hevur eisini opnað nakrar dyr hjá okkum, at vit á skeiðnum fingu spurningar at arbeiða við, sum vit neyvan annars høvdu hugsað um at viðgjørt, men sum vísa seg at hava stóran týdning fyri okkara hjúnalag."*